FYLGISKJAL 3

LM-018/2022

Hoyringsskriv til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (Oljuískoyti til húski)

Nú prístalið er hækkað óvanliga nógv og m.a. prísurin á olju er nógv hækkaður, er umráðandi, at landsstýrið veitir fíggjarligan stuðul til einstaklingar og familjur við lágum inntøkum at gjalda fyri olju. Týdningarmikið er alsamt at royna at byrgja uppfyri, at alsamt fleiri og fleiri føroyingar mugu liva í fátækradømi.

Fátækraváðamarkið var í 2020: 153.622 kr.

Sambært uppskotinum hjá landsstýrinum eru treytirnar fyri at fáa oljuískoyti:

Ein vaksin í húskinum: 290.000 kr. áðrenn skatt

Tvey ella fleiri í húskinum og 0, 1 ella 2 børn: 390.000 kr. áðrenn skatt

Tvey ella fleiri vaksin í húsinum og 3 ella fleiri børn: 410.000 kr. áðrenn skatt

Føroya Astma-/Allergifelag heldur, at inntøkumarkið fyri húski, har tvey ella fleiri eru í húskinum, eigur at verða munandi hækkað. Hetta serstakliga tá vit hava í huga, at í Danmark fáa húski, ið hava inntøku, sum er upp til 650.000 kr., oljuískoyti frá danska statskassanum.

Tað er gott og alneyðugt, at láginntøkubólkar fáa peningaligan stuðul til hækkaðar oljuútreiðslur.

Ein bólkur, ið er serstakliga hart raktur av hækkaða prístalinum og oljuprísunum, eru ung undir 25 ár, sum t.d. vegna sjúku fáa uppihaldsveiting. Sambært "Vælferðarlógini" fáa hesi eina sera lága uppihaldsveiting at liva av. Meðan føroyska fátækraváðamarkið í 2020 var 153.622 kr., fáa hesi ungu veiting, sum er knappan triðing av hesi upphædd.

Tey, ið eru undir 25 ár og búgva saman við einum ella báðum foreldrum, fáa einans 22% av fullari uppihaldsveiting, hetta svarar til 4.165 kr. um mánaðin ella 49.980 kr. um árið áðrenn skatt (tvs. 103.642 kr. undir fátækraváðamarkinum). Henda upphædd er ein rein fátækraveiting, sum ongin kann liva av. At bøta eitt vet um sosialu støðuna hevði verið hóskandi, at hesin bólkur fekk skattafrítt oljuískoyti uppá 7.000 kr. uttan at lata inn umsókn.

Ung undir 25 ár, ið búgva saman við øðrum vaksnum, fáa 7.573 kr. um mánaðin ella 90.873 kr. um árið áðrenn skatt (tvs. 62.749 kr. undir fátækraváðamarkinum). Henda upphædd liggur eisini langt undir fátækraváðamarkinum. At bøta um sosialu støðuna hevði somuleiðis verið hóskandi, at hesin bólkur fekk skattafrítt oljuískoyti uppá 7.000 kr. uttan at lata inn umsókn.

Ognarmørkini í uppskotinum eru alt ov lág. Sambært uppskotinum kann ognin í mesta lagi vera 30.000 kr. fyri eitt ella tvey fólk. Hetta ognarmark átti, í minsta lagi, at verið tvífaldað og verið ásett til 60.000 kr.

LM-018/2022

Ognarmarkið fyri trý ella fleiri fólk er sambært uppskotinum ásett til 50.000 kr. Hetta mark átti somuleiðis, í minsta lagi, at verið tvífaldað og verið ásett til 100.000 kr.

Tað er týdningarmikið fyri fólk at kunna eiga eina lítla ogn at dúva uppá, um og tá óvæntaðar útreiðslur stinga seg upp.

Tórshavn, hin 26.08.2022

Føroya Astma-/Allergifelag